# Super stevna



Tað er ikki á hvørjum degi, at so nógv fólk savnast á Skála

Mynd: Kristmund



Fólk hugnaðu sær á Fjarðastevnu. Vísusangurin og grillfestivalurin vóru serstakliga væl umtókt.

Mynd: Kristmund

**Fyrireikararnir av Fjarðastevnu kundu næstan ikki ímyndað sær betri stevnu**

STEVNA

*Heri á Røgvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fyrsta Fjarðastevnan á Skála líður út móti endanum. Stóri stevnudagurin var leygardagin, og tá savnaðust nógv fólk á Skála.

- Stevnan hevur eydnast ótrúliga væl, og vit eru stak væl nøgd. Veðrið var okkum til vildar, og øll tiltøkini hepnaðust væl, sigur Tóra Joensen, forkvinna fyri Skála stuðlar, sum hava fyriskipað Fjarðastevnuna.

Eini túsund fólk vóru til kappróðurin. À kvøldi varð skipað fyri grillfestivali. Har luttóku eini fimmhundrað fólk, og alt kjøtið varð etið upp. Afturvið matinum sungu Ronnie og Sámal vísusangir, og fólk hugnaðu sær ófórt. Fólk kundu keypa sær ymiskt grillað kjøt og kundu sita inni í einum telti ella úti og njóta mat og vísusang.

## Hugnaligt

Tórbjørn Jacobsen helt midnáttarrøðuna. Hann er kendur fyri sínar røður og orð, og fólk vóru ikki skuffaði. Hann blandaði altjóða eygleiðingar og lokalar søgur saman til eina forkunnuga røðu.

- Eisini á Skála hevur vónin sigrað. Kanska í túsund ár. Onkur heldur, at tað vóru fyrstu eftirkomararnir hjá Gøtuskeggjum, ið settust niður her. Hugsandi, táið vit síggja hvussu væl skálamenn hava ment seg í fótbóltspælinum. Gitin er Ormur Bóndi. Materialistur, jarðardrottur - men onki andsmenni. Seyðakjøtið var honum alt, segði Tórbjørn Jacobsen millum annað.

Dansurin í ítróttarhøllini við Country bólkinum savnaði eini fimmhundrað fólk.

Mestsum øll Skála bygd hevur verið í sving fyri fáa bygdina klára og fyriskipa stevnuna.

Mett verður, at eini 150 fólk hava verið til arbeiðis á ymsan hátt stevnudagarnar.

- Tað er altið okkurt, sum kundið verið betri. Men tað rætta vit til næstu ferð, sigur Tóra Joensen.

Sunnudagin var hugnakvøld, har eini 160 fólk leitaðu sær. Eitt annað sera væl umtókt tiltak var djóragarðurin, har serliga børnini hugnaðu sær.

Nógvu stevnugestirnir fløva eisini hjartað á kassameistaranum hjá Skála stuðlum. Enn er ikki gjørt upp, hvussu nógv stevnan hevur givið, men fyrireikararnir meta, at væl er komið inn.

Eisini løgreglan letur væl at. Hóast nógv fólk og nógvir bilar, so gekk alt upp á stás, og løgreglufólkini nýttust ikki at gera annað enn at fylgja við.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 27, 2005
www.kaupthing.fo

# Bumbuatsóknir lítla ávirkan

MARKNAÐARRÁK

Bumbuatsóknirnar í London ávirkaðu bæði partabrøv og lánsbrøv hósdagin í farnu viku. Bæði partabrøv og rentur lækkaðu í tímunum eftir atsóknirnar, tá íleggjarar skiftu sveiggjandi partabrøvini út við tey tryggaru lánsbrøvini. Hetta var tó mest líkt einum upplopi, tí bæði partabrævakursir og rentur vóru dagin eftir aftur á sama stigi sum áðrenn álopini. Tað er sostatt ikki talan um somu ávirkan, sum kom eftir 11. september, tá tað tók fleiri vikur fyri marknaðirnar at koma fyri seg. Bumburnar í m.a. Casablanca og Madrid síðan tá, hava vant marknaðirnar við yvirgang.

## Lánsbrøv

10-ára danska rentan liggur enn og sveiggjar um 3,15%. Sjálvt ikki ein amerikonsk arbeiðsmarknaðarfrágreiðing, sum var eyðsýnt vánaligari enn marknaðirnir væntaðu, fekk renturnar longur niður. Tað bendir á, at 10-ára rentan kann fáa trupult við at koma niður um 3,00% komandi vikurnar.

## Partabrøv

Hósmorgunin, tá yvirgangurin herjaði London, lækkaðu norðurlendsku partabrøvini einans 3,3%. Fýra tímar seinni vóru partabrøvini longu hækkaði 2% aftur og dagin eftir lógu partabrøvini hægri enn áðrenn bumbubrestirnar. Hetta ber boð um, at partabrævamarknaðirnir eru sterkir í løtuni. Eftirsum einki av stórum týdningi fyri ídnaðin varð rakt, hevur álopið at kalla einans rakt ferðavinnuni partabrøv.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna koma lyklatøl úr USA, sum kunnu ávirka dollarakursin. Tey mest áhugaverdu eru handilsjavnin fyri mai og prísvøksturin í juni. Marknaðirnir vænta, at bæði verða óbroytt. Um hugt verður eftir teimum norðurlendsku partabrøvunum, liggja hesi aftur á methøgum stigi og eru hækkaði 17,5% í ár. Hetta kann føra við sær vinningsstaðfesting, men sterki marknaðurin bendir á, at vinningsstaðfestingar neyvan fara at føra við sær tær stóru lækkingarnar. Tá marknaðirnir líkt longu hava gloymt yvirgangin í London, sær eisini út til, at partabrøvini kunnu standa seg væl eina tíð afturat.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 623,00 | -0,1% | ↓ |
| JPY | 5,55 | -0,4% | ↓ |
| GBP | 1.082,85 | -1,7% | ↓ |
| NOK | 94,62 | 1,1% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,34 | 0,0% | → |
| Evru Lánsbrøv | 176,21 | -0,3% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 96,17 | 1,6% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 65,39 | 0,9% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*